## United-leikari skaddur í eitt ár

Knæskaðin hjá Ji-sung Park sýnist at vera verri enn fyrst væntað, og stúrt verður nú fyri, at koreanski Manchester United-leikarin má halda steðg í eitt heilt ár. Ji-sung Park hevur ikki verið á vøllinum síðan síðst í mars, tá ið hann og liðfelagarnir úr Manchester United leikti ímóti Blackburn. Í dystinum skoraði Park eitt mál, men hetta fer tó neyvan at vera ein minnisríkur dystur hjá koreanska landsliðsleikaranum. Hann fekk nevniliga ein álvarsligan knæskaða, sum nú krevur eina skurðviðgerð. Hann kann vænta, at hann heldur ikki kemur á vøllin komandi kappingarár.



## Agger tosar ilt um Drogba

Tað eru ikki tey nógvu rósandi orðini, ið danski Daniel Agger hevur á tunguni um Didier Drogba. Orðini koma eftir dystin millum liðini í Champions League-hálvfinaluni mikudagin í síðstu viku. – Hann er ein sjónleikari, men tað er jú hansara spælistílur, sigur sterki danski Liverpool-verjuleikarin, sum í morgin saman við liðfeløgunum skal royna at vinna á Chelsea við meir enn einum máli, fyri at røkka finaluni í Champions League.



*Tað var ivamál, hvørt West Ham yvir høvur fekk loyvi at brúka Carlos Tevez til dystin móti Wigan. Men við stórspæli frá júst Tevez vann West Ham ein sera týðandi sigur*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Risa-bót til West Ham

**London felagið skal rinda 60 milliónir krónur í bót, tí teir boru seg skeivt at, tá Carlos Tevez og Javier Mascherano vórðu keyptir til felagið. Enn stríðast teir tó fyri sessinum í bestu ensku deildini**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Tað var sera óvæntað, tá teir báðir undan hesum kappingarárinum skiftu til lítla West Ham. Fleiri stórfeløg høvdu sýnt teimum áhuga, og eitt skifti hevði Tevez ein príslepa a 600 mió kr. um hálsin. Ein prísur, sum í øllum førum dempaði áhugan hjá stórfeløgunum, men sum eisini gjørdi, at eitt felag sum West Ham als ikki skuldi ditta sær nakrar dreymir yvirhøvir.

**Sluppu væl**

Tí vakti handilin stóran ans, og skuldsetingar um, at ein triði partur í veruleikanum áttu spælararnar, komu skjótt fram.

West Ham eru nú funnir sekir í ákærunum, men fleiri høvdu tó væntað, at revsingin varð harðari enn "bert" ein bót. Felagið hevur tó skift eigarar, síðani handilin varð gjørdur, og í ensku miðlunum verður gitt, at revsingin varð linari, ta nýggi formaðurin - Eggert Magnusson - alt fyri eitt viðgekk, at felagið hevði framt brot á reglurnar.

Hevði felagið eisini mist stig fyri gøluna, vildi niðurflytingin verið mest sum púrasta vís. Men enn stríðist West Ham av øllum alvi fyri lívinum í deildini. Leygardagin vunnu teir tryggan 3-0 sigur á Wigan, og nú er bjargingin bert trý stig burturi.

Mansunglingar

**Gólv**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Olivur Debes Eiriksfoss | HF | 10,25 |

**Ringar**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Olivur Debes Eiriksfoss | HF | 5,5 |

**Paralell barr**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Olivur Debes Eiriksfoss | HF | 1,9 |

Menn

**Gólv**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Høgni Øster | HF | 12,85 |
| 2 | Rósing Dam | HF | 12,15 |
| 3 | Fróði Mortensen | HF | 11,1 |
| 4 | Gutti Harryson | HF | 11 |
| 5 | Jóni Christiansen | HF | 10,95 |
| 6 | Kristian í Lon Olsen | Støkk | 10,2 |

**Lop**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Gutti Harryson | HF | 12,95 |
| 2 | Rósing Dam | HF | 12,825 |
| 3 | Fróði Mortensen | HF | 12,75 |
| 4 | Kristian í Lon Olsen | Støkk | 12,525 |
| 5 | Eyvind A. Hansen | HF | 12,4 |
| 6 | Høgni Øster | HF | 12,175 |

**Ringar**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Gutti Harryson | HF | 11,8 |
| 2 | Rósing Dam | HF | 11,25 |
| 3 | Fróði Mortensen | HF | 11,1 |
| 4 | Eyvind A. Hansen | HF | 11 |
| 5 | Kristian í Lon Olsen | Støkk | 8 |
| 6 | Høgni Øster | HF | 5,1 |

**Paralell barr**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Rósing Dam | HF | 12,1 |
| 2 | Høgni Øster | HF | 5,35 |
| 3 | Eyvind A. Hansen | HF | 4,4 |
| 4 | Jóni Christiansen | HF | 3,4 |
| 5 | Kristian í Lon Olsen | Støkk | 1,8 |

**FM-kappingin leygardagin**

| Nr. | Kvinnuunglingar | | Biti | Gólv | Lop | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Natasha Olsen | Ljósið | 7,9 | 6,9 | 8,25 | 23,05 |
| 2 | Eyðna Danielsen | HF | 7,2 | 6,8 | 8,15 | 22,15 |
| 3 | Birita Poulsen | HF | 6,7 | 6,5 | 8,05 | 21,25 |
| 4 | Beinta Joensen | HF | 6,6 | 6 | 8,5 | 21,1 |
| 5 | Herdis Thomsen | HF | 7,1 | 5,2 | 7,7 | 20 |

| Nr. | Kvinnur | | Lop | Biti | Gólv | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Elinborg T. Durhuus | Ljósið | 13,4 | 9,65 | 11,7 | 34,75 |
| 2 | Sonja Joensen | Støkk | 12,2 | 11,05 | 11,5 | 34,75 |
| 3 | Kristina Toftegaard | Støkk | 13 | 10,2 | 11,4 | 34,6 |
| 4 | Silja Højgaard | Støkk | 12,85 | 9,05 | 11 | 32,9 |
| 5 | Brim H. Hoydal | Ljósið | 12,15 | 9 | 11,7 | 32,85 |
| 6 | Monika Poulsen | Støkk | 12,25 | 9,5 | 10,55 | 32,3 |
| 7 | Birita Dahl Christiansen | HF | 11,6 | 10,05 | 10,25 | 31,9 |
| 8 | Anita Knudsen | Støkk | 11,6 | 8,75 | 10,35 | 30,7 |
| 9 | Fríðhild Norðgerð | Støkk | 11,7 | 8,6 | 10,4 | 30,7 |
| 10 | Erla Sundberg Patursson | HF | 11,95 | 7,65 | 10,3 | 29,9 |
| 11 | Vár Poulsen | HF | 11,8 | 8,75 | 9,3 | 29,85 |
| 12 | Anna H. Joensen | Støkk | 11,3 | 7,6 | 10,25 | 29,15 |
| 13 | Sólja av Skarði | HF | 11,2 | 8,1 | 8,1 | 27,4 |

| Nr. | Mansunglingar | | Gólv | Lop | Ringar | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Olivur Debes Eiriksfoss | HF | 9,9 | 11,75 | 4,15 | 25,8 |

| Nr. | Menn | | Gólv | Lop | Ringar | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Gutti Harryson | HF | 11,55 | 12,45 | 11,6 | 35,6 |
| 2 | Høgni Øster | HF | 11,9 | 13,15 | 10,1 | 35,15 |
| 3 | Fróði Mortensen | HF | 11,6 | 12,1 | 11,2 | 34,9 |
| 4 | Rósing Dam | HF | 11,2 | 13 | 10,4 | 34,6 |
| 5 | Eyvind A. Hansen | HF | 9,4 | 12,8 | 11,35 | 33,55 |
| 6 | Jóni Christiansen | HF | 11,3 | 12,2 | 5 | 28,5 |
| 7 | Kristian í Lon Olsen | Støkk | 9 | 12,05 | 5,8 | 26,85 |

**Amboðsfimleikur**

**Kvinnuunglingar**

**Lop**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Eyðna Danielsen | HF | 8,55 |
| 2 | Birita Poulsen | HF | 8,35 |
| 3 | Natasha Olsen | Ljósið | 8,3 |
| 4 | Beinta Joensen | HF | 7,9 |
| 5 | Herdis Thomsen | HF | 7,45 |

**Biti**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Natasha Olsen | Ljósið | 7,85 |
| 2 | Eyðna Danielsen | HF | 7,45 |
| 3 | Beinta Joensen | HF | 7,4 |
| 4 | Birita Poulsen | HF | 6,85 |
| 5 | Herdis Thomsen | HF | 5,85 |

**Gólv**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Birita Poulsen | HF | 7,95 |
| 2 | Natasha Olsen | Ljósið | 7,55 |
| 3 | Beinta Joensen | HF | 6,35 |
| 4 | Herdis Thomsen | HF | 5,35 |

Kvinnur

**Lop**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Elinborg T. Durhuus | Ljósið | 13,35 |
| 2 | Silja Højgaard | Støkk | 13,15 |
| 3 | Kristina Toftegaard | Støkk | 12,8 |
| 4 | Brim H. Hoydal | Ljósið | 12,05 |
| 5 | Sonja Joensen | Støkk | 12,05 |
| 6 | Monika Poulsen | Støkk | 11,9 |

**Biti**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Sonja Joensen | Støkk | 11,15 |
| 2 | Elinborg T. Durhuus | Ljósið | 9,9 |
| 3 | Monika Poulsen | Støkk | 9,55 |
| 4 | Silja Højgaard | Støkk | 9,45 |
| 5 | Kristina Toftegaard | Støkk | 9,3 |
| 6 | Birita Dahl Christiansen | HF | 9 |

**Gólv**

| Nr. | Luttakari | Felag | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Kristina Toftegaard | Støkk | 11,9 |
| 2 | Elinborg T. Durhuus | Ljósið | 11,6 |
| 3 | Silja Højgaard | Støkk | 11,3 |
| 4 | Brim H. Hoydal | Ljósið | 11,3 |
| 5 | Sonja Joensen | Støkk | 10,65 |
| 6 | Monika Poulsen | Støkk | 10 |